

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 05 - 2013

# Gera oljurisa nær Føroyum kláran til framleiðslu

Um trý ár rennur oljan upp frá nýggjastu oljuútbyggingini vestan fyri Hetland, Clair Ridge, ikki so langt frá føroyska markinum. Og tað eru ikki smávegis støddir tosað verður um, tá oljuútbyggingar fara fram eystan fyri føroyska landgrunnin, á tí risastóru Clair oljukelduni i bretskum øki. Norskar fyritøkur hava verið so hepnar at fáa lut í hesi stóru útbygging vestan fyri Hetland. Undirstellið, sum skal bera sjálvan pallin uppi, vigar 23.000 tons og er 168 metrar høgt. Økið hesin parturin av oljupallinum skal standa á er á støðd við ein fótbóltsvøll. Umboð fyri BP siga seg vera sera væl nøgd við arbeiðið, sum norska fyritøkan Kværner hevur latið úr hondum  hetta er verkfrøðingalist í heimsflokki sigur eitt umborð fyri BP sambært aftenbladet.no. Undirstellið verður í næstum flutt til leiðirnar vestan fyri Hetland. Nýggi oljupallurin skal framleiða ikki minni enn 700 milliónir tunnur av olju komandi mongu árini ella 100.000 tunnur um dagin. Nýggja Clairútbyggingin skal vera liðug í 2016. Clair oljukeldan varð funnin í 1977, men ikki fyrr enn í 2005 varð tøknin so mikið ment, at tað varð gjørligt at taka fyrstu oljuna upp. Og nú verður so hildið fram at útbyggja við enn einum palli, og tann triðja útbyggingin er longu á tekniborðinum hjá BP. Myndir Risastora undirstellið til oljupallin bygt Norra Soleiðis koma teir baðir pallarnir at siggja ut Kortið visir Clair Ridge miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið